

*Eiðis Ljómfelag spældi undir setanini*

kanska tað yngra ættarliðið betri enn fleiri av samtíðarfólkunum. Síðani tók at dragna í røðini og vit fingu snara lastvogninum, tvøstinum og spikinum og sett kósina suðureftir landinum. Vit vóru honum sera takksamir, skal sigast.

Nú er alt øðrvísi. Heimurin verður standardiseraður. Mentanarliga og kommercielt. Heilaga globaliseringin dregur sum ein sentrifuga, kapitalurin sentraliserast, og lynna og tæða vit ikki væl í egið jørðildið, og verja okkara egnu og serstøku mentan, og serliga málið, so verða ættarliðini kultiveraði samsvarandi amerikansku eindarmentanini, sum rekur úr alnótini. Skiftið er týðiligt. Táið ungdómar vóru á barrikadunum fyri kortum, í Fraklandi, royndi forsætisráðharrin at koma á tal við teir ígjøgnum sjónvarpið, men har var ongin responsur, bara tómt bergmál, tann miðilin er eftir øllum at døma passé, og ikonið, hin grótharði Jack Petersen, er tekin um tað sama. Alkendur í Føroyum langt fyri at nakar norðanfyri visti hvør maðurin var. Íspunnin á eini at kalla ókendari heimasíðu, nú dagliga umrøddur ímillum manna, eitt tekin um at frekvensurin er fluttur frá standandi almennu myndini til zapparan, sum finnur út í hvønn krók heimsins. Menniskja fer at líkjast alt meira eini kamæleón, sum má hava antennurnar úti áhaldandi, skal tað fylgja við øgiligu ferðini, fyri ikki at vera tveitt av í harðligu svingunum. Sjálvt um tað regnar av himli við alskins tilboðum, sum skaldið sigur: í harlem, babi yar, rovaniemi, valpareiso, í havn og á bókasavninum, har tað harumframt lekur millum teori og praksis, meira enn heilin oftani er førur fyri at taka ímóti, at absorbera, so er umráðandi, alt avgerandi, at halda fast um mótstøðuførið, resistensin, sum bara er kjølfestan úr egnari mentan, søgu og máli.

Hetta kemur ikki av sær sjálvum, tað tykist materian at gera. Vøkstur er svarið. Glitur, skrúð og reytt skarlakk. Nýggju gullkálvarnir eita virðisbrøv, obligatiónir, transaktiónir, arbitrasja og partabrøv. Hvør sparibússa verður í hesum døgum tømd, fyri at keypa partabrøv í kolossinum, bankanum, sum hesi somu fólkini bjargaðu undan týning í ringastu kreppu nakrantíð. Ikki sørt, at hetta gevur assosiatiónir aftur til yrkingina hjá Líggjasi í Bø, um mannin og moldina. Eins og hann helt seg kunna eta moldina, tykist tað sum, at hesi nýggju aktiumenniskjuni halda seg kunna eta partabrøvini í Føroya Banka, ja, kanska kennast tey so euforiserandi, at onkur heldur seg sleppa til himmals við teimum. Hetta er ein gamal menniskjansligur veikleiki. Paulus ávarar longu um hetta í fyrra brævinum til Timoteus. Í sætta kapitlinum, ørindini 17, 18 & 19, er hann ógvuliga bersøgin, fyri ikki at siga eirindaleysur, táið hann boðar hesum unga manni frá: Teimum, sum eru ríkir í hesum núverandi heimi, skalt tú bjóða, at teir ikki mega vera hugmóðigir, heldur ikki byggja vón sína á hitt ótrygga ríkidømið, men á Guð, sum gevur okkum allar lutir ríkiliga til nýtslu, at teir skulu gera gott, vera ríkir í góðum verkum, vera gávumildir, beinasamir, so at teir savna sær sjálvum niðurfyri ein góðan grundvøll fyri komandi tíð, til tess at teir kunna grípa hitt sanna lívið.

Stutt er eftir til longsta dag. Hásummartíð. Ljósið sum lekir. Mennir uppdriftina og vónina. Gloymi ongantíð smábørnini á miðjari nátt, táið vit í polarsummarinum plagdu at koma inn ímóti eini grønlendskari bygd, og tey lupu og dansaðu sum smálomb á klettunum, tað ráddi um at brúka sólina á tamb áðrenn tørnað varð innaftur í vetrarniðuni. Soleiðis er alt livandi. Eisini her hjá okkum. Stevnurnar eru ein partur av hesum. Ljósinum. Kappróðurin. Fótbólturin. Festivalarnir. Lesandi ungdómurin, sum kemur heim úr útlandinum at súgva føroyska ljósið í seg, at fylla sær akkumulatorarnar, áðrenn hann setst aftur, undir ingeniørlampuni úti undir onkrari væðing í lestrarmetropolunum, at brynja høvdið til at dugna einum uppaftur betri vælferðarsamfelagi enn tey fóru frá. At lyfta tað upp í eina uppaftur hægri sferu.

Sundalagið er í fer við at menna seg til eitt kraftsentur. Vinnuliga í broddi fylkingar. Útgerðarmenn í heimsklassa, virkir, ídnir leverandørar í sethúsum, betongblandarar, bøndur og handilsmenn. Eitt virkið fólk, sum ikki hevur hildið tað verið neyðugt, at havt bringuna frammanfyri høvdið. Í kommunuregi hava teir tikið hegnpelarnar upp, ivaleyst eftir ráðum frá Jean Jacques Rousseau, og lagt saman, og visti man ikki betur, var ein ivaleysur í, at Sunda Kommuna var ein av heimsins metropolum, táið Jallurin í Norðstreymoy, Heðin Zachariassen, gevur tingmonnum eina lektión í, hvussu sundalagsmenn takla teir ymsu trupulleikarnar, ið kunnu stinga seg upp har fjølmeingjað er av fólki. Í vídd næststørsta kommuna í landinum.

Her hava teir eisini havt revahald. Í tíðini táið tað seinri so kenda revagarðssyndromið varð spunnið í. Kastaði ein hundur sær á vatninum, varð hvør SEVpeli álopin av hundum úr øllum heraðshornum. Flakavirki á hvørjum tanga. Stállínuskip og trolari í hvørjari bygd. Og bátahylur har slapst fram at fjørðuni. Igulkerini fingu tó ongi bein at ganga á, hóast royndir vóru gjørdar syðri á landinum, fyri at økja um gessin í hinum fjarskotna Tokyo.

Nú eg standi her, koma til hugs myndir, íkomnar frá søgum og samrøðum. Hin fænomenali forteljarin Jóhannes Olsen. Stórmenni. Hann fær meg at hugsa um Hvalastøðina. Vænti ikki at tilmælið, sum nú er komið, kemur til høldar í praksis. Skula politikkararnir skilja tað neyðuga í at varðveita støðina, og tað skal hon, so eigur hon at gerast ein partur av Føroya Náttúrugripasavni. Tað eigur at verða flutt norður higar, og helst skal hon eisini dubbast til at taka ímóti stórhvali aftur, sum væntandi verður hjávinna í Føroyum, táið menniskja, eisini umhvørvisfantastarnir fara at skilja, at javnvágirnar í natúruni mega skipast og regulerast eftir burðardyggum kriterium.

Ein annar er Hanus á Heygnum. Maðurin og bóndin, sum stýrdi kommunala ravmagnsfelagnum í ørgrynni av árum. Onki stríð. Ongi óneyðug orð. Hábærið. Mær fyrikemur, at hann hevur stjórnað umboðsráðnum, sum ein annar aðalskrivari í politbureaui. Skilvíst. Ivaleyst stundisligur í øllum, eg minnist í hvussu er, at sonur hansars Hóraldur, kendur granskari og harmonikuspælari, í studentatíðini á Kostdeildini í Hoydølum, varð settur at skipa fyri kimingini, táið allur riðilin av dreingjum skuldi í skúla og táið etast skuldi í matstovuni. Hann røkti ódnina til fulnar. Har var ongin slingur í valsinum.

Kári Petersen er ein annar. Nú kendur búskaparfrøðingur. Í starvi hjá Landsbankanum og íðin debattørur. Einaferð smádrongur í Hvalvík. Sonur prestahjúnini Petur og Karolinu. Eitt sjaldsamt samankók av missión og skírnarstevnu, men tað forðaði teimum ikki í góðum samstarvi, av berari og blektari idealismu og filantropii, at lynna væl meira enn tey flestu undir hin veikara partinum av okkara fólki. Teir søgdu um aldarinnar skipara í hinari øldini, Júst í Túni, at hann keypti fólki tað, sum hann helt tey hava tørv á. Óvanligt gávumildni. Seinasta átak hansara í føroyskari aling sigst hava verið í svimjihylinum her í Hvalvík. Hann og Karolina vóru systkin. Appropos fótbóltur, sum nú er vorðin ein subreligión í Sundalagnum, av góðum og væl skiljandi grundum, so vóru prestahjúnini og Kári einaferð suðuri í bretska høvuðsstaðnum London og vitjaðu. Á ferðini júkaði Kári upp í saman aftur, at hann kundi hugsa sær at fingið ein ítróttarbúna líkan honum hjá kenda London-felagnum Arsenal. Hetta gav Karolinu stórt høvuðbrýggj. Samanskrúvað sum hon var, har mátti ongin sita eftir. Annaðhvørt keypti hon ongan búna ella keypti hon øllum dreingjunum í Hvalvík hendan sama búna. Hon tók eina eksistensiella avgerð, og valdi seinru loysnina. Mær er sagt, at hetta er orsøkin til, at at kalla allir hvalvíkingar í dag eru supportarar hjá Arsenal. Nógv er broytt síðani spælt varð í skotum og á strætum. Nú blása aðrir vindar í verøld. EB/Streymur hevur fingið sítt Highbury, sítt Emirat stadion, frammi í dalinum, ein hóskiligur residensur hjá fremsta FM-kandidatinum í ár. Nomaduarábararnir, sum Viderø fjakkaði ímillum fyri fjøld av árum síðani, brúka nú oljufæið at keypa sær til stuttleika og undirhald í domum uttanlands, ongin veit nær teir ota seg fram í Saksunardal á hesi heimsferðini. Her er nógv hent síðani Bergur Magnussen tambaði meskarnar við sínum kanónskotum.

At vera burðardyggur er vorði ein dogma í okkara tíð. Nú at fleiri vandatekin eru í sól og mána um, at menniskja er farið undir at forkoma sær egnum bústaði, klótuni, um tað ikki verður saðla um í stundini, serliga á umhvørvisøkinum, er tað lívgevandi, at serliga sundalagsmenn vóru frammalaga frá byrjan. Fyri sína tíð. Konfirmatiónsfelagin Jógvan Mørkøre var stavnamaður. Hetta fær meg at hugsa um profetiið í endanum á Ferð míni til Jorsala, skrivað eftir heimkomuna til Hvalvíkar, eftir at hann leyp upp á brúnna í Streymnesi við viðførinum, har Viderø tykist hava havt varðhugan av verðurlagsbroytingunum, sum nú eru farnar at ríða monnum sum marran, hann sigur: ”Vit mala tær æviga nátt. Sólina vit sleingja burt á ókomandi leiðir. Vit mala hóstandi ísfjøll, sum knúst rapa niður úr norðannátt yvir fløtur og feitilendi. Vit sorla allar býir undir jøklaveldi - - -. Vit kvøða – við frostbitnum hjarta - - - til kvørnin klovnar.

Nýliga hava fornfrøðingar funnið heimsins fyrstu stjórn, regjering, í eini grøv í Mesopotanien. Tað tykist sum hevur hon gjørt kollektivt sjálvmorð, helst tí at ongin stjórn hevði verið undan henni, sum hon kundi turka sína egnu politisku óhumsku í. Tað tykist vera blivin ein óskikkur, at sitandi vald, bara situr á rókini sum undandóttur og livir av farnum skeivleikum. Valdsmenniskja tekur ikki í egnan barm, ongin nevndur ongin gloymdur. Soleiðis verður tað ikki framhaldandi hjá teimum, ið nú fara at stjórna heimsins londum, og á umhvørvisøkinum hjálpir ongin góða mamma, heldur ikki ein undanfarin stjórn, sum ikki dugdi at taka betri partar fyri seg, skal mannaættini verða lív lagað. Hakast má í materiellu girndina, útlátið má normaliserast. Samsvarandi Kyoto og øðrum millumtjóða sáttmálum, fyri at skipa javnvágirnar aftur. Ætlanin var at vit skuldu røkja og ikki misrøkja skapanarverkið, sum varð givið okkum, sum lán frá eftirkomarunum.

Takk eiga tit ið lýddu á og máttu tit øll somul havt eina framhaldandi góða stevnu.